# Pensjóns- & tryggingaravtala

## millum

betri

&

blf

## Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya

Februar 2019

# INNIHALDSYVIRLIT


§1: FORMKRØV ........ 3

STK. 1 AVTALUPARTAR ........ 3
STK. 2 AVTALUGRUNDARLAG ........ 3
STK. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN ........ 3
STK. 4 UPPTØKUTREYTIR ........ 3
STK. 5 INNLIMAN ........ 3
STK. 6 PENSJÓNSGJALD ........ 4
STK. 7 TILSKILAN ........ 4
STK. 8 FARLOYVI / GJALDSKÁI ........ 4
STK. 9 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI ........ 4
STK. 10 AFTURKEYP ........ 5
STK. 11 SKATTUR OG AVGJØLD ........ 5
STK. 12 FRÁBOÐAN ........ 5

§2: BÓLKATRYGGING ........ 5

STK. 1 LÍVSTRYGGING ........ 5
STK. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING ........ 6
STK. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING ........ 6
STK. 4 TRYGGINGARGJALD ........ 6
STK. 5 TILLAGAN AV TRYGGINGARGJALDI ........ 6

§ 3: GJALDSUNDANTØKUTRYGGING ........ 6

STK. 1 GJALDSUNDANTØKA ........ 6
STK. 2 HÁMARK FYRI ÓARBEIÐSFØRIS / GJALDSUNDANTØKUUPPHÆDDINA ........ 7

§ 4: PENSJÓNSSAMANSPARING ........ 7

STK. 1 PENSJÓNSSAMANSPARINGIN ........ 7
STK. 2 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI ........ 7
STK. 3 LUTFALL MILLUM LÁNSBRØV OG PARTABRØV ........ 7

§ 5: ANNAÐ ........ 7

STK. 1 ÓSEMJA ........ 7

§ 6: ÍGILDISKOMA ........ 8

# §1: FORMKRØV

## Stk. 1 AVTALUPARTAR

Pensjóns- & tryggingaravtalan er gjørd millum Betri Pensjón (BP) og Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya (BLF).

## Stk. 2 AVTALUGRUNDARLAG

Afturat ásetingunum í avtaluni galda reglurnar í Almennu tryggingartreytunum hjá BP, tryggingartreytir fyri bráðsjúku, Tryggingaravtalulógin, Eftirlønarlógin, Rentutryggingarlógin og aðrar viðkomandi lógir.

Tryggingarnar verða roknaðar á útrokningargrundarlagnum hjá Betri Pensjón, ið er góðkent av Tryggingareftirlitinum.

## Stk. 3 GILDISTÍÐ OG UPPSØGN

Avtalan er skrivað í tveimum einsljóðandi eintøkum og hevur gildi frá 2019.

Avtalan er galdandi fyri eitt ár í senn, men heldur fram um ikki annað er avtalað. Báðir partar kunnu - við 3 mánaða freist - siga avtaluna upp við skrivligari ávaring til tann 1. í einum mánaði.

Verður avtalan uppsøgd, halda limirnir fram við sjálvstøðugari trygging við sama innihaldi, sum er galdandi fyri hesa avtalu. Tó verða tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

## Stk. 4 UPPTØKUTREYTIR

Treytin fyri upptøku eftir hesum sáttmála er, at viðkomandi er limur í BLF og hevur fullan arbeiðsførleika.

## Stk. 5 INNLIMAN

Limir fylla út tekningarskjøl við innliman.

Tryggingin tekur við, tá BP hevur móttikið neyðugar upplýsingar til skráseting.
Limir, ið við innliman eru 52 ár ella eldri, kunnu velja, at alt inngjaldið verður nýtt til eftirlønarsamansparing.

## Stk. 6 PENSJÓNSGJALD

Samlaða pensjónsgjaldið verður inngoldið mánaðarliga frammanundan av arbeiðsgevara í sambandi við lønarútgjalding.

Pensjónsgjaldið steðgar tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur nátt pensjónsaldur.

## Stk. 7 TILSKILAN

Um einki annað er tilskilað verður goldið út til "næsta avvarðandi".

Hugtakið "næsti avvarðandi" fevnir í fyrstu atløgu um hjúnafelagan. Um eingin hjúnafelagi er, fáa lívsarvingar, t.v.s. børnini, tryggingarupphæddina. Eru eingir lívsarvingar, verður útgoldið sambært arvalógini.

Er ynski um at tilskila onnur enn "næsta avvarandi", skal tað fráboðast skrivliga til BP. Á heimasíðuni www.betri.fo finst skjalið "Tilskilan", sum skal útfyllast og sendast til BP.

Hevur limurin innsett ein tilskilaðan í sambandi við deyða, verður útgoldið uttan um búgvið. Hetta er galdandi bæði fyri samansparing og bólkatrygging. Her kunnu kravánarar (kreditorar) ikki gera krav í upphæddunum.

## Stk. 8 FARLOYVI / GJALDSKÁI

Um limur fer í farloyvi, skal BP hava skrivliga fráboðan um hetta skjótast tilber, og í seinasta lagi 1 mánað eftir fyrsta farloyvisdag.

Limur kann velja sjálvur at halda fram við at gjalda inn í farloyvistíðini, bæði til pensjón og tryggingar.

Eisini er møguleiki fyri at søkja um gjaldskáa upp til eitt ár. Gjaldskái kann bert veitast, um tryggingargjald er goldið í minsta lagi eitt ár frammanundan, og samansparda virðið er hægri enn tryggingargjaldið í tíðarskeiðnum við gjaldskáa.

## Stk. 9 ÚR PENSJÓNSAVTALUNI

Um limur fer úr BLF, ella á annan hátt ikki lýkur upptøkutreytirnar í hesi pensjónsavtalu, skal hetta fráboðast BP skjótast gjørligt.

Limur kann venda sær til BP og avtala, hvussu tryggingaravtalan skal halda fram. Møguligt er at halda fram við sama innihaldi, sum er galdandi fyri hesa avtalu. Tó verða tryggingargjald og treytir roknað á grundarlagnum fyri einstaklingar.

### Stk. 10 AFTURKEYP

Afturkeyp av samansparda virðinum kann einans fara fram í tráð við galdandi reglur í Eftirlønarlógini og Rentutryggingarlógini. Er samanspart virðið flutt frá einari skipan har Fíggjarmálaráðið er sáttmálapartur, verður *"Reglugerð í samband við pensjónsskipanir, har Fíggjamálaráðið er sáttmálapartur"* at galda fyri henda partin av samansparingini.

### Stk. 11 SKATTUR OG AVGJØLD

Sambært Eftirlønarlógini pr. 01.01.2014, verður skattur á 40% rindaður við inngjald, Tískil eru øll útgjøld skattafrí.

### Stk. 12 FRÁBOÐAN

Tá ið avtala er gjørd við limin, verður fráboðan send BLF, sum váttar limaskapin.

BP kunnar TAKS um tey viðurskifti, sum fráboðanarskyldan ásetur í samband við eftirlønarsamansparingar.

## §2: BÓLKATRYGGING

### Stk. 1 LÍVSTRYGGING

Verður útgoldin, um limur doyr, áðrenn hesin hevur fylt 67 ár.

Tryggingarupphæddin er kr. 1.000.000,- Upphæddin verður niðurskrivað fram móti pensjónsaldrinum, sum víst niðanfyri.

| Aldur | Upphædd |
|---|---|
| 18-61 | 1.000.000 |
| 62 | 900.000 |
| 63 | 800.000 |
| 64 | 700.000 |
| 65 | 600.000 |
| 66 | 500.000 |
| 67 | 0 |

## Stk. 2 BRÁÐSJÚKUTRYGGING

Um limur fær eina av bráðsjúkunum, ið eru nevndar í tryggingartreytunum fyri bráðsjúku, fær viðkomandi útgoldið eingangsupphædd á **kr. 150.000,-**. Bráðsjúkan skal verða staðfest, áðrenn limurin er fyltur 67 ár. Møguligt útgjald verður ikki mótroknað í veitingini við deyða.

Fær barn hjá limi staðfest eina bráðsjúku, verður útgoldin eingangsupphædd á **kr. 150.000,-**

## Stk. 3 ÓARBEIÐSFØRISTRYGGING

Óarbeiðsføristrygging er trygging til mistan arbeiðsførleika. Tryggingin verður útgoldin, um limurin gerst í minsta lagi 2/3-óarbeiðsførur.

Limurin ásetur tryggingarupphæddina við innliman.

Árliga tryggingarupphæddin kann ikki setast lægri enn kr. 92.900,- (2019). Upphæddin svarar til ta inntøku, sum Almannastovan loyvir, áðrenn tey mótrokna í teirra veitingum. Fyri limir, sum við innliman eru 45 ár og eldri, er hetta ikki eitt krav.

Upphæddin á kr. 92.900 verður partur av bólkatryggingini. Hetta merkir, at kostnaðurin er tann sami fyri allar limir, uttan mun til aldur og kyn.

## Stk. 4 TRYGGINGARGJALD

Mánaðarliga tryggingargjaldið fyri 2019 er kr. 609,78.

## Stk. 5 TILLAGAN AV TRYGGINGARGJALDI

Allar bólkatryggingar verða gjørdar fyri 1 ár í senn. Gjaldið verður eftirmett 1. januar á hvørjum ári.

# § 3: GJALDSUNDANTØKUTRYGGING

## Stk. 1 GJALDSUNDANTØKA

Gjaldsundantøka er galdandi fyri tryggingar. Limurin kann velja eisini at tekna Gjaldsundantøkutrygging fyri pensjón.

Hetta merkir, at um limur gerst 2/3 óarbeiðsførur, rindar BP framhaldandi fyri tryggingarnar. Um limurin hevur teknað Gjaldsundantøkutrygging fyri pensjónsgjaldinum, rindar BP eisini pensjónsgjaldið. Goldið verður eftir 3 mánaða óarbeiðsføri. Inngoldið verður, so leingi óarbeiðsførið stendur við, og limurin er á lívi, tó í mesta lagi fram til ásettan eftirlønaraldur.

Treytin fyri hesi trygging er, at limurin ikki er fyltur 60 ár, tá tryggingin verður teknað. Um limurin velur eisini at tekna Gjaldsundantøkutrygging fyri pensjónsgjaldi, skulu heilsuupplýsingar innlatast og góðkennast.

### Stk. 2 HÁMARK FYRI ÓARBEIÐSFØRIS / GJALDSUNDANTØKUUPPHÆDDINA

Samlaða árliga upphæddin við óarbeiðsføristrygging og gjaldsundantøku kann ikki verða hægri enn kr. 300.000,-.

## § 4: PENSJÓNSSAMANSPARING

### Stk. 1 PENSJÓNSSAMANSPARINGIN

Inngjøld og útgjøld verða handfarin sambært ávikavist Eftirlønarlógini og Rentutryggingarlógini.

### Stk. 2 ÍLØGUR OG AVKAST AV SAMANSPARINGINI

Pensjónin verður rentað við marknaðarrentu.

Við innliman kann limurin velja millum hesar íløgubólkar

- bert lánsbrøv
- varið váðastøði (láns- & partabrøv)
- lágt váðastøði (láns- & partabrøv)
- miðal váðastøði (láns- & partabrøv)

Ynskir limurin seinni at broyta íløgubólk er hetta møguligt. Broyting av íløgubólki kann gerast pr. tann 1. í einum mánaði. Hetta skal fráboðast í mánaðinum frammanundan. Tað er ókeypis hjá liminum at broyta váðastøði.

Avkastið av pensjónini, verður tilskrivað mánaðarliga á eftirlønarkontu hjá liminum.

### Stk. 3 LUTFALL MILLUM LÁNSBRØV OG PARTABRØV

Lutfallið millum lánsbrøv og partabrøv er tengt at aldrinum hjá einstaka liminum, sum víst í fylgiskjali nr. 1.

## § 5: ANNAÐ

### Stk. 1 ÓSEMJA

betri

Eru viðurskifti, fevnd av hesum sáttmála, sum limurin er ónøgdur við, kann limurin venda sær til tryggingarkærunevndina.

Ein treyt fyri at reisa mál fyri kærunevndina er, at limurin fyrst hevur roynt at fáa í lag eina nøktandi loysn við Betri Pensjón. Eydnast tað ikki, skal skrivlig kæra - skrivað á donskum - sendast kærunevndini saman við ávísum gjaldi. Um limurin fær heilt ella partvíst viðhald, verður gjaldið afturrindað.

Eftir umbøn frá liminum sendir Betri Pensjón útfyllingarblað í sambandi við kæru. Betri Pensjón er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

Kæran skal sendast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2, 1.
DK-1572 København V.
Tel. +45 33 15 89 00

## § 6: ÍGILDISKOMA

Pensjóns & tryggingaravtalan er gjørd millum Betri Pensjón og Búskapar- & Løgfrøðingafelag Føroya. Avtalan er skrivað í tveimum einsljóðandi eintøkum og hevur gildi frá 01.02.2019. Báðir partar kunnu uppsiga sáttmálan við 3. mánaða freist fram til tann 1. í einum mánaði.

Hesin sáttmálin kemur ístaðin fyri pensjóns- og tryggingaravtaluna undirskrivað 03.10.2016.

Tórshavn, tann 25/1-19

**BETRI PENSJÓN**

Tórshavn, tann 25/1-19

**BÚSKAPAR- & LØGFRØÐINGAFELAG FØROYA**

, formaður

, næstforkvinna



blf

betri

# FYLGISKJAL 1

Galdandi býti millum láns- og partabrøv í mun til íløgupuljur (2019)

| | Varið | | Lágt | | Miðal | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aldur | Partabrøv | Lánsbrøv | Partabrøv | Lánsbrøv | Partabrøv | Lánsbrøv |
| 25 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 26 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 27 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 28 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 29 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 30 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 31 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 32 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 33 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 34 | 30,0 | 70,0 | 50,0 | 50,0 | 75,0 | 25,0 |
| 35 | 29,4 | 70,6 | 48,9 | 51,1 | 73,3 | 26,7 |
| 36 | 28,8 | 71,3 | 47,8 | 52,2 | 71,6 | 28,4 |
| 37 | 28,1 | 71,9 | 46,7 | 53,3 | 69,8 | 30,2 |
| 38 | 27,5 | 72,5 | 45,6 | 54,4 | 68,1 | 31,9 |
| 39 | 26,9 | 73,1 | 44,5 | 55,5 | 66,4 | 33,6 |
| 40 | 26,3 | 73,8 | 43,4 | 56,6 | 64,7 | 35,3 |
| 41 | 25,6 | 74,4 | 42,3 | 57,7 | 63,0 | 37,0 |
| 42 | 25,0 | 75,0 | 41,3 | 58,8 | 61,3 | 38,8 |
| 43 | 24,4 | 75,6 | 40,2 | 59,8 | 59,5 | 40,5 |
| 44 | 23,8 | 76,3 | 39,1 | 60,9 | 57,8 | 42,2 |
| 45 | 23,1 | 76,9 | 38,0 | 62,0 | 56,1 | 43,9 |
| 46 | 22,5 | 77,5 | 36,9 | 63,1 | 54,4 | 45,6 |
| 47 | 21,9 | 78,1 | 35,8 | 64,2 | 52,7 | 47,3 |
| 48 | 21,3 | 78,8 | 34,7 | 65,3 | 50,9 | 49,1 |
| 49 | 20,6 | 79,4 | 33,6 | 66,4 | 49,2 | 50,8 |
| 50 | 20,0 | 80,0 | 32,5 | 67,5 | 47,5 | 52,5 |
| 51 | 19,4 | 80,6 | 31,4 | 68,6 | 45,8 | 54,2 |
| 52 | 18,8 | 81,3 | 30,3 | 69,7 | 44,1 | 55,9 |
| 53 | 18,1 | 81,9 | 29,2 | 70,8 | 42,3 | 57,7 |
| 54 | 17,5 | 82,5 | 28,1 | 71,9 | 40,6 | 59,4 |
| 55 | 16,9 | 83,1 | 27,0 | 73,0 | 38,9 | 61,1 |
| 56 | 16,3 | 83,8 | 25,9 | 74,1 | 37,2 | 62,8 |
| 57 | 15,6 | 84,4 | 24,8 | 75,2 | 35,5 | 64,5 |
| 58 | 15,0 | 85,0 | 23,8 | 76,3 | 33,8 | 66,3 |
| 59 | 14,4 | 85,6 | 22,7 | 77,3 | 32,0 | 68,0 |
| 60 | 13,8 | 86,3 | 21,6 | 78,4 | 30,3 | 69,7 |
| 61 | 13,1 | 86,9 | 20,5 | 79,5 | 28,6 | 71,4 |
| 62 | 12,5 | 87,5 | 19,4 | 80,6 | 26,9 | 73,1 |
| 63 | 11,9 | 88,1 | 18,3 | 81,7 | 25,2 | 74,8 |
| 64 | 11,3 | 88,8 | 17,2 | 82,8 | 23,4 | 76,6 |
| 65 | 10,6 | 89,4 | 16,1 | 83,9 | 21,7 | 78,3 |
| 66 | 10,0 | 90,0 | 15,0 | 85,0 | 20,0 | 80,0 |



blf